# 2002



***Apríl:*** *Í apríl var aftur verkfall í Føroyum. Skipara- og navigatørfelagið og Fíggjarmálastýrið kundu ikki semjast um lønirnar, og sostatt varð nógv tað mesta av flutningskervinum og infrastrukturinum í Føroyum lagt lamið. Verkfallið vardi í ein góðan mánað. Til 14. mai, tá nýggjur sáttmáli varð undirskrivaður*



***Mars:*** *Tað var rómur í høllini í Trongisvági, tá kvinnurnar hjá TB fingu handað gullkrónurnar sunnudagin 3. mars fyri at gerast FM vinnari í flogbólti*




***Mars:*** *Vestmanna kann av røttum rópa seg hondbóltsbygdin mikla. Bæði kvinnurnar og menninir gerast føroyameistarar í 1. deild leygardagin 23. mars 2002.*




***Mars:*** *Fram gerst føroyameistari í meistaradeildini í flogbólti hjá monnum*



# 2002

***Apríl:*** *30. apríl slapp veljarin at siga sítt. Kring alt landið var metstór valluttøka, 91,6%, til eitt tað mest spennandi løgtingsvalið í longri tíð. Lisbeth L. Petersen og Sambandsflokkurin vunnu valið, men tað gjørdist kortini ikki nóg mikið í síðsta enda at fáa Anfinn Kallsberg úr løgmansstólinum. Millum tey 32 kosnu vóru níggju nýggj andlit*





***Mai:*** *13. mai varð avdúkað, at danin Henrik Larsen skuldi gerast nýggjur føroyskur landsliðsvenjari hjá landsliðnum í fótbólti. Mótmælini vóru mong fyrstu tíðina. Men við góðu úrslitini móti serliga Liktinstein, Skotlandi og Týsklandi tagnaðu mótmælini, og Henrik Larsen hevur nú eina heila tjóð aftan fyri seg*



***Mai:*** *Heidi Andreasen varð innstillað til heitið sum ársins ítróttarfólk fyri brekað og vitjaði á stórum hátíðarhaldi í Monaco. Hóast hon ikki vann, so var vitjanin í Monako eitt upplivilsi fyri lívið. Her er hon avmyndað við Boris Becker, fyrrverandi tennisleikara*



***Juni:*** *6. juni varð samgonguskjalið undirskrivað, og nýggja landsstýrið varð avdúkað. Fyrrverandi samgongan hevði fingið Miðflokkin afturat sær fyri at varðveita meirilutan. Nýggir landsstýrismenn gjørdust: Páll á Reynatúgvu, Bill Justinussen og Annlis Bjarkhamar.*